## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Móttøka



Hotel Runavík
Sjómansheimið

Hevur almenna móttøku
leygardagin 19. mars 2005 frá kl. 12 - 15

Í sambandi við at hotellið letur upp, verður listaframsýning við Magna Mikkelsen av Toftum

Øll eru vælkomin

Hotel Runavík
Sjómansheimið

Heiðavegur 6 · 620 Runavík · Tel 44 74 20 · Fax 44 88 30
info@hotel-runavik.fo · www.hotel-runavik.fo

# Ungir menn við góðum hugskoti

**– Vit halda, at prísurin á óinnspældum fløgum er alt ov høgur. Tað ætlaðu vit at gera nakað við, siga teir báðir føroysku tannáringarnir, Emil J. Larsen og Kjartan F. Andreasen, sum nú hava latið upp ein nýggjan online-handil**

HANDLAR
*Snorri Brend*



*Teir báðir ungu menninir, sum nú bjóða bíligar fløgur til føroyska marknaðin gjøgnum internetið - vm. Kjartan Andreasen og Emil Larsen høgrumegin*

– Endamálið við handlinum er at fólk skulu kunna keypa ta bíligastu CD'ina og bíligasta DVD'in hjá okkum, siga Emil og Kjartan.

Sambært teimum báðum eru hesir prísirnir í Føroyum ikki veruleikakendir, men alt ov høgir. Men tað ætla teir nú at bøta um.

Teir hava tí stovnsett online-handilin við heitinum flogan.net, har úrval og prísir eru at síggja, eins og møguleiki er at bíleggja sær fleiri av hesum vørum.

– Vit vóna, at nógv fara at taka undir við ætlan okkara, siga teir báðir spentu tannáringarnir.

### Íløgu í vørur

Kjartan er vaksin upp og býr í Føroyum, og dugir tí væl føroyska málið, meðan Kjartan er hálvur føroyingur. Hann er føddur í Danmark, og skrivar og tosar tí bara danskt.

Emil flutti úr Danmark til Føroyar fyri at ganga í 10. flokki, og skal aftur til Danmarkar í summar.

Í Føroyum hevði hann ikki altíð so nógv at gera í frítíðini, so hann avgjørdi tí at fara undir vinnuligt virksemi.

– Eg setti allan sparipeningin í vørur. Síðani gjørdi eg mær eina heimasíðu, og nú er handilin so smátt farin í gongd, sigur Emil.

### Eftir skúlatíð

Talan er her um ein internet-handil, og tí verður bara selt gjøgnum internetið. Av hesi orsøk er einki stað ella bústaður, har ein kann fara og hyggja eftir vørunum.

Teir miða kortini eftir at hava fasta telefontíð millum kl. 16 og 20, har teir fegnir svara spurningum um tær vørurnar, teir bjóða fólki.

Tá ein hevur bílagt vørurnar hjá handlinum kann ein kann avheinta tær á einum bústaði í Føgrulíð í Havn eftir kl. 17 á degi.

– Vit hava verið noyddir at gera tað soleiðis, tí at vit jú ganga í skúla gerandisdagar, siga teir báðir Emil Jákup og Kjartan.

## Fýra prosent eru arbeiðsleys

Talið av fulltíðararbeiðsleysum er framvegis vaksandi. Í januar varð tað uppgjørt til 1.163 fólk, ið svarar til 4,3% av arbeiðsfjøldini. Tey flestu árini er ein vøkstur í arbeiðsloysistølunum frá desember til januar. Fyri betri at kunna meta um tað veruliga arbeiðsloysið, verður lagt upp fyri tílíkum afturvendandi fyribrigdum við at árstíðarjavna tølini.

Fyri januar í ár var tað árstíðarjavnaða arbeiðsloysisprosentið uppá 4. Hetta er tað størsta talið, vit hava havt í Føroyum í eini fýra ár. Verður sammett við grannalond okkara, eru tað bert Ísland og Noreg, ið hava lægri arbeiðsloysi enn Føroyar. Í Íslandi var arbeiðsloysið í 4. ársfjórðingi í fjør 2,5 prosent, og í Norra 3,6 prosent í desember í fjør.

## Dagurin

**17. mars. Geirtrúð**, deyð 659.

Dóttir Pippin eldra og abbasystir Karlamagnus. Fór ung í kleystrið Nivelles í Belgia og gjørdist eisini abbadissa har. Millum annað var hon verndari hjá ferðandi fólki, og við vegirnar nógvastaðni í Europu vórðu bygd sanktugeirtrúðtilhald, har tey ferðandi og tey fátækastu kundu fáa hjálp. Við hesi tilhald vórðu sett upp vakurt málaðar træmyndir av Sanktu Geirtrúð við gyltari krúnu. Av veðri og vindi fóru málingin og gyllingin av hesum myndum, og av tí kemur tiltakið, at *ljómin er farin av Sanktu Geirtrúð*. Undir hesum býr kanska eisini tað, at teir gomlu søgdu, at var regn geirtrúðardag, fór at vera regnsummar.

Navnið er týskt, samansett av orðunum *spjót* og *styrki*.

Hesin dagurin verður í Mykinesi nevndur **pátriksmessa**. Pátrikur var áspostul Írlands. Tá ið hann doyði í 461, hevði hann bygt nógvar kirkjur og stovnað kleystur, og tað var frá hesum kleystrum, at írskir munkar hava leitað higar og fingið sær tilhald – eitt nú í Mykinesi, har pátriksmessa hevur verið hildin. Men tað er líkt til, at eisini aðrastaðni í Føroyum hava teir tikið til Pátrik. Pátriksmessudagur var dagur, sum teir gomlu ikki høvdu álit á til veður. Hann var eisini ein av *gandadøgunum*, sum vóru sjey í tali, og tosað kundi eisini verða um *íragand*.

Latínska navnið *patricius* merkir *aðalsmaður*.

# Octavia-grannar inni á Gøtu

Í grannalagnum inni á Gøtu í Hoyvík komu herfyri tríggir nýggir Skoda Octavia bilar. Hetta hendi, tá Jóhan Joensen, Jóhannes Guttesen og Magnus Hentze keyptu hvør hvør sín bil av sama slagi.




*Grannar inni á Gøtu við hvør sínum nýggja Skoda Octavia - f.v: Jóhan Joensen, Jóhannes Guttesen og Magnus Hentze. Á myndini eru eisini Frits og Birgir Dam Jacobsen frá Norðbil.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*